**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Aquatics Federation (FRO)
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Nordic Swimming Federation (NSF)
European Aquatics (LEN)
World Aquatics (AQUA)
International Life Saving Association (ILS)

# Reglugerð um tænastuferðir

**Grein 1**

Starvsnevndarlimir, sum ferðast uttanlands í ørindum fyri SSF ~~meira enn 10 dagar í einum kalendaraári~~, hava rætt til fult endurgjald fyri teir kostnaðir, sum standast av hesum virksemi. Somuleiðis hava landsliðsvenjarar, ferðaleiðarar og onnur hjálparfólk í landsliðsørindum rætt til fult endurgjald fyri teir kostnaðir, sum standast av hesum virksemi, í tann mun sum ikki annað er ásett í sáttmála við hesi.

**Grein 2**

Kostnaðir sum koma undir Grein 1 eru fyri ferðing, kost og gisting.

**Grein 3**

Starvsnevndin skal hava givið loyvi til tænastuferð uttanlands, áðrenn ferðin kann byrja.

**Grein 4**

Útreiðslur til ferðing við flogfari, skipi ella bussi o.t. verða endurgoldnar eftir rokning. Ferðing eigur at fara fram á bíligasta hátt.

**Grein 5**

Fyri innivist verða rímiligar útreiðslur goldnar ímóti rokning, eftir avtalu við ~~formann~~ forfólk SSF.

Um gist verður privat verður einki endurgjald latið.

**Grein 6**

Rindað verður 700 kr. í A-inntøku fyri hvønn ferðadag, íroknað bæði fráfaringar- og heimkomudag, til tey í grein 1 nevndu.

**Grein 7**

Í seinasta lagi eina viku eftir heimkomudagin skulu tey í grein 1 nevndu hava latið endaligu ferðauppgerð við øllum neyðugum skjølum til skrivstovuna hjá SSF.

**Grein 8**

Tá starvsnevndin hevur góðkent ferðauppgerðina verður endurgjaldið rindað.

*Góðkend av aðalfundi hjá Svimjisamband Føroya ~~6. juni 2019~~ 13. apríl 2024*.

ATLANTIC AIRWAYS